## Ford hevur onga neyð

Meðan kappingarneytarnir Chrysler og General Motors dagliga kæra seg um tørvin á hjálp frá tí almenna USA, sigur Ford, at har hava tey ikki ikki brúk fyri almennari hjálp. Forstjórin í Ford, Alan Mulally, segði í gjár, at fyritøkan lænti 160 milliardir krónur longu í 2006 og hevur tí ikki tørv á almennari hjálp nú. Chrysler og General Motors siga harafturímóti, at tær hava brúk fyri 120 milliardum krónum frá Kongressini.

## Stórbanki í stórari neyð

Gjáramorgunin boðaði niðurlendski stórbankin ING frá, at forstjórin, Michel Tilmant, hevði gjørt av at leggja frá sær í summar. Sambært nevndini hevur forstjórin valt at fara frá orsakað av teirri óvanligu gongdini í seinastuni, sum sagt varð. Samstundis kunngjørdi nevndin, at hon hevði gjørt av at siga 7.000 fók úr starvi. ING kom í trupulleikar seinasta heyst og fekk tá góðar 60 milliardir krónur frá niðurlendsku stjórnini. ING er millum tjúgu teir størstu bankarnar í heiminum.

Ársins almenni leiðari

# Hjalti er verjuleikarin hjá

**Á samkomu á Hotel Føroyum fríggjadagin í farnu viku, fekk Hjalti í Jákupsstovu heiðurin "Ársins almenni stjóri 2009". Karmarnir kundu fyri so vítt ikki verið meira passandi, tí á teimum fremstu plássunum í salinum við teimum 250 luttakarunum sótu umboð fyri høvuðsvinnu okkara; fiskivinnuna. Ein vinna, sum Hjalti í Jákupsstovu hevur verið í "kríggj" við síðani hann í 1988 bleiv stjóri á Fiskirannsóknarstovuni. Vit hava hitt verjumannin hjá fiskastovnunum til eitt prát um burðardygga vinnu og fiskivinnugransking.**



*– Tekur mann um endan nú, og setur í verk eina skilagóða burðardygga veiðu, so ganga bara eini tvey ár til vit hava vit eina nógv sunnari og sterkari fiskivinnu, sigur Hjalti í Jákupsstovu frá Fiskirannsóknarstovuni, sum er fyrsti almenni stjóri, ið er valdur "Ársins almenni leiðari"*

ÁRSINS ALMENNI LEIÐARI
*Leif Láadal*

Tað eru nøkur viðurskiftir, sum skulu vera upp á pláss, um tú skalt skapa tær virðing millum manna. Til dømis er tað gott at fáa rætt av og á – kanska serliga, um tað seinni vísir seg at tú hevði rætt. Og tað er í hesum føri ikki so galið at vera treiskur.

Tann føroyingur, sum næsta árið kann rópa seg "Ársins almenni leiðari" er so at siga ímyndin av hesum omanfyrinevnda. Hann er treiskur sum fáur, og so vísir tað seg sum oftast, at hann hevur rætt í tí, sum hann sigur, tó at nógv fólk ikki eru samd, í tí hann sigur tað.

Vit tosa um stjóran á Fiskirannsóknarstovuni, Hjalta i Jákupsstovu. Ein mann, sum m.a. hevur tað uriasstarv at skula fortelja føroyingum einaferð um árið, at teir fiska ov nógv av stovnunum. Hann skal út í almenningin at siga, at vit mugu fiska, og harvið forvinna minni. Men hetta við at forvinna minni, er ikki nakað, sum vit skulu gera í longdini, tí við skilagóðari veiðimentan, kemur sum frá líður enn meiri ríkidømi upp á land. Tað eru tað bara ikki øll, sum skilja.

### Náðileysur

Á vegginum í trappuni á veg upp á ta hædd, har Hjalti í Jákupsstovu hevur skrivstovu úti á Fiskirannsóknarstovuni, hanga nakrir fiskar. Hetta eru fiskar, sum eru stoyptir úr onkrum tilfari, síðani málaðir og hongdir til pynt. Eg hugsi til stuttleika, hvør av hesum fiskum passar best til Hjalta í Jákupsstovu, í tí eg gangi framvið. Um tað passar, at tað ber til at seta ein steinbít fastan í stokkin (sum eg tó ivist í), so má tað vera hesin treiski kjaftsterki fiskurin, sum passar best til stjóran á Fiskirannsóknarstovuni. Ikki tí, onkur meiri taktisk begávaður fiskur hevði eisini riggað, tí tað krevur bæði styrki og vit at duga at snúgva sær, tá mann arbeiðir so langt frammi í almennu umsitingini – og í so nógv ár.

Uttan alt ov nógv "small talk" kasta vit okkum beint inn í eina samrøðu um burðardygga veiði. Hjalti er um ikki náðileysur, so í hvussu so er avgjørdur:

– Tá eg sigi við reiðarar og fiskimenn, at vit mugu minka veiðitrýstið niður í eina helvt - altso má allur flotin fara niður í eina helvt ella má helvtin av fólkinum fara til hús - svara teir aftur við at siga, at tað er nakað møsn, og í veruleikanum skilji eg væl teirra reaktión.

– Mín boðskapur til vinnuna svarar jú til, at onkur kom til mín og bað meg fara niður í eina helvt í løn, tí tað er í veruleikanum tað sum eg biðji teir, samanber Hjalti í Jákupsstovu.

Munurin er so bara – sum eg (blaðmaðurin, blaðm.) skilur tað - at reiðarin, ið verður biðin um at minka um veiðutrýstið, bjargar einari framhaldandi vinnu, um hann ger tað, sum hann verður biðin um, og kann so um nøkur ár heystað fruktirnar av tí sparda – kanska fleirfalt. Ella hvat?

> »Mín boðskapur til vinnuna svarar jú í summum førum til, at onkur kom til mín og bað meg fara niður í eina helvt í løn«
> *Hjalti í Jákupsstovu*

### Skulu bert fiska ein triðing

Fiskirannsóknarstovan heldur, at veiðitrýstið ikki má vera meira enn 33 prosent, tí annars minka stovnarnir so nógv, at teir koma ikki fyri seg so hvørt. Broytingar í umhvørvinum hjá fiskinum hava eisini ávirkan á støddina á stovninum, men við einum veiðitrýsti upp á í mesta lagi ein triðing av stovninum, er eisini pláss fyri natúrligum broytingum, sigur Hjalti í Jákupsstovu.

Veiðitrýstið er í fleiri førum væl hægri enn tað, sum fiskifrøðingar sum Hjalti í Jákupsstovu mæla til, so hvat hendir, um nú vinna og politikarar lurta eftir fiskifrøðingunum, og ikki fiska ein einasta fisk meira enn tilmælini frá serfrøðingunum?

Tað er kanska ein hypotetiskur spurningur, tí soleiðis fer tað ivaleyst ongantíð at vera, heldur onkur, men spurningurin er kortini áhugaverdur, tí í longdini er neyðugt at lurta eftir teimum, sum hava best innlit í